Týskari í geglið eftir bardaga

Sunnukvøldið varð ein týskur sjómaður tikin av løgreglu-uni í Havn eftir bardaga í Tórshøll

POLITI
Eyðun Klakstein

Um midnáttarleitið sunnukvøldið fóru tveir mans til hendurs í klubbanum, Tórshøll, í Havn.

Annar maðurin var føroyingur, meðan hin var ein týskur sjómaður, sum hevði leitað sær ein túr í býin sunnukvøldið. Menninir gjørdust so heitir, at tað endaði við bardaga teirra millum.

Løgreglan varð boðsend, og tá løgreglumenninir komu á staðið, royndi týski sjómaðurin at flýggja av staðnum. Løgreglan fekk tó fatur á manninum, sum varð handtikin og settur í geglið.

Passið hjá sjómanninum var drigið inn, og fyrrapartin í gjár skuldi maðurin til avhoyringar á Politigarðinum í Havn. Maðurin verður helst ákærður fyri hendingina sunnukvøldið, og meðan løgreglan gjørdi sítt arbeiðið slapp týski trolarin ikki avstað av Havnini.

Føroyingurin, sum stríddist við týska sjómanninum, var kannaður av lækna, men skaðin var ikki álvarsamur.

Ein maður av hesum týskar trolaranum, sum lá á Havnini um vikuskiftið, endaði í geglinum sunnukvøldið eftir rok í klubba í høvuðsstaðnum

Scania og Smyril hittust

Leygardagin var nógv ferðsla á vágni í Klaksvík, og Smyril fekk høvi at heilsa upp á sín avloysara

SAMFERÐSLA
Eyðun Klakstein

Í mai mánaði skal Scania eftir ætlan loysa Smyril av í siglingini millum Havnina og Suðuroynna.

Mynd:SJH

Klaksvík: Estlendska ferjan, Scania, hevur síðani páskirnar røkt siglingina millum Norðoyggjar og meginøkið, og tað fer Scania at gera í eina tíð aftur.

Dúgvan, sum er í dokk á Skála, verður klár um mánaðarskiftið, og tá skal Scania so í nýggja rutu.

Leygardagin fekk Smyril høvi at heilsa upp á avloysaran hjá sær, tá stórsta strandfaraskipið gjørdi leigutúr fyri Eimskip til Klaksvíkar. Flutningsfelagið skuldi hava eina ørgrynnu av byngjum til Havnar, og hesum flutningi tók Smyril sær av.

Tá Dúgvan fer aftur í sigling um Lorvíksfjørð, skal Scania avloysa Smyril, sum skal í dokk.

Norðoyingar eru vælnøgdir við Scaniu, hóast ferjan siglir til Fuglafjarðar og ikki altíð klárar at halda ferðaætlanina neyvt.

Másin klárur til summarið

Másin var málaður bláur á bedingin í Klaksvík í farnu viku

SAMFERÐSLA
Eyðun Klakstein

Másin fekk ein umgang við nýggjum liti á bedingin í Klaksvík í farnu viku

Strandfaraskipið Másin var í farnu viku á beding í Klaksvík, har hann varð gjørdur klárur til summarsiglingina.

Umframt vanliga viðlíkahaldið skifti Másin eisini til nýggja strandfaralitin. Blái Másin fór av beding fríggjadagin og er nú farin aftur í sigling.

Meðan Másin var uppi á turrum røkti Súlan siglingina í norðasta parti av landinum.

Útoyggjarnar fram at í fjølmiðlunum

Útoyggjanevndin heldur, at kanska skulu loyvi til loftmiðlarásir innihalda krøv um, at smáu oyggjarnar eisini fáa ágóðan av tiltøkunum

MIÐLAR
Eyðun Klakstein

Útoyggjanevndin heldur, at smáu oyggjarnar skulu sleppa meiri fram at í føroysku loftmiðlunu,.

– Kunning frá smáu oyggjunum til meginøkið er eins týdningarmikil sum kunningin til smáu oyggjarnar, sigur Útoyggjanevndin í sínum áliti.

Útoyggjanevndin heldur, at eitt hugskot hevði verið, at útoyggjarnar fingu fastan tátt í almennu fjølmiðlunum, har tær nakrar minuttir um dagin ella vikuna vórðu settir av til tíðindi og annað.

– Gongdin á fjølmiðlaøkinum er, at útvarpsstøðir og møguliga sjónvarpsstøðir fara at vaksa í tali. Tí er tað avgerandi neyðugt, at politisk støða verður tikin til, í hvønn mun loyvi til tílíkar støðir skulu innihalda krøv um, at útjaðarin og smáu oyggjarnar ieisini skulu fáa ágóða av hesum tiltøkum, sigur Útoyggjanevndin.